

www.oljan.fo

**Jan Müller** 19 - 08 - 2013

# Goldman Sachs spáa hægri oljuprís

Amerikanski íløgubankin Goldman Sachs heldur, at oljuprísurin (Brent) um stutta tíð fer at hækka til 115 dollarar fyri tunnuna. Í løtuni er hann umleið 110 dollarar. Orsøkin til henda spádómin er órógv á veitingum í Libya og Irak, skrivar Bloomberg News. Íløgubankin skrivar í eini nýggjari frágreiðing, at heimsins oljugoymslur eru munandi skerdar og spáar, at Brent oljuprísurin eftir heilt stutta tíð fer at hækka til 115 dollarar fyri tunnuna. Tað er órógv í veitingum úr Libya, sum hava varað nógv longri enn roknað við, sum eru ein høvuðsorsøkin til príshækkingina. Og tað sæst heldur ein loysn á hesum í bræði. Hóast stríðið í Egyptalandi stendur við og versnar, so tykist tað ikki at hava beinleiðis ávirkan á oljuprísin í løtuni, tó at tað í eina tíð hevur verið medvirkandi til, at prísurin er komin í eina væl hægri legu enn fyri nøkrum fáum mánaðum síðani. Heldur ikki tykist flutningurin av olju gjøgnum Suez veitina at verða ávirkaður av innanhýsis stríðnum í Egyptalandi.

